# Viðtøkur
# fyri
# Tórshavnar býarsavn

**Grein 1**
**Endamál og rakstur**

Tórshavnar býarsavn er ogn Tórshavnar kommunu. Savnið hevur til endamáls:

a) at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, sum lýst er í løgtingslóg um friðing av føstum fornminnum og bygningum.

b) at fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum. Føroya Fornminnissavn skal góðkenna útgrevstrarætlanina og geva útgrevstrarloyvi.

c) at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttir til søguligar hendingar.

d) at hava í hondum savnan at staðarnøvnum og munnliga goymdum søgnminnum og hava hetta tilfar greitt til vitskapliga gransking.

e) at savna saman mest møguligt tilfar av øllum, ið viðvíkur Tórshavn, so allir tættir av Havnar søgu kunnu verða skrivaðir, og um neyðugt at skipa fyri at hon verður skrivað.

f) Savnið kann útvega sær fígging til verkætlanir uttaneftir. Landskassin hevur tó ikki endurgjaldsskyldu fyri útreiðslur savnsins, ið verða fíggjaðar á henda hátt.

Tað skal virka soleiðis, at tað hevur uppiborið studning eftir galdandi lóg um bygdasøvn. Neyðugur peningur til tess verður játtaður av kommununi, (samanber § 4 í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn).

**Grein 2**
**Bygnaður og savnsnevnd**

Tórshavnar býarsavn er skipað sum kommunalur stovnur undir mentamáladeildini, og savnvørðurin vísir fyrisitingarliga til leiðaran á mentamáladeildini.

Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs er savnsnevnd hjá Tórshavnar býarsavni og hevur ábyrgd av rakstrinum. Savnið hevur sítt fakliga samstarv beinleiðis við landsantikvarin.

**Grein 3**
**Virkisumdømi**

Virkisumdømið hjá Býarsavninum er Tórshavn, Argir, Hoyvík, Hvítanes, Sund og Kaldbak við serligum atliti at Tórshavnar býi. Býráðið kann tó eftir uppskoti frá savnsnevndini og í samráð við landsantikvarin skipa fyri, at deildir undir býarsavninum verða stovnaðar á plássum, sum hoyra til kommununa.

**Grein 4**
**Fyrisiting**

Savnvørðurin hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum av savninum innan teir karmar, viðtøkurnar seta.

**Grein 5**
**Tryggingar**

Savnsognirnar skulu vera tryggjaðar.

**Grein 6**
**Roknskapurin**

Savnsroknskapurin skal vera hildin soleiðis, at tað altíð er lætt at síggja, hvussu fíggjarstandurin er. Roknskaparárið er frá 1. januar til 31. desember. Roknskapurin verður hildin av roknskapardeild býráðsins, grannskoðaður av grannskoðarunum hjá kommununi. Grannskoðaður roknskapur verður saman við frágreiðing frá farna árinum latin landsantikvarinum at góðkenna til ásettu tíð.

**Grein 7**
**Avtøka av savninum ella broyting í skipanini.**

Viðtekur býráðið at halda uppat við savnsarbeiðinum skal frágreiðing um hetta verða send landsantikvarinum. Heldur savnið heilt uppat, verður víst til bygdasavnslógina.

**Grein 8**
**Gildi viðtøkunnar**

Henda viðtøka fær gildi, tá ið hon er samtykt á býráðsfundi og góðkend av landsantikvarinum og landsstýrinum. Býráðið kann gera broytingar í viðtøkuni, men skulu tær tá góðkennast av landsantikvarinum og landsstýrinum.

–

*Broyttar viðtøkur: Broyting av §§ 2 og 4 samtykt av Tórshavnar býráð 11.09.2008, góðkend av landsantikvarinum 10.10.2008 og av landsstýriskvinnuni í mentamálum 10.11.2008.*